# Arbeiðið á vandamiklum vegi í Suðuroynni lagt stilt


*Maskinurnar hava nú staðið stillar í einar tríggjar vikur og sostatt er arbeiðið at bøta upp á ein tann vandamesta landsvegin í landinum, steðgað. Ósemja er um grótið, sum verður sprongt burtur*

**Landsverkfrøðingurin og hovbingar eru ósamdir um endurgjaldið fyri grótið, sum verður tikið burtur**

ENDURGJALDSKRAV
*Áki Bertholdsen*

Arbeiðið at bøta um ein tann ringasta og vandamiklasta landsvegin í øllum landinum, er nú steðgað.

Í nakrar vikur hevur Landsverkfrøðingurin arbeitt við at spreingja ein kneysa burtur fyri at at gera tað allarsmalasta av vegnum omanfyri Hov í Suðuroy, breiðari, men nú er arbeiðið steðgað.

Orsøkin til, at arbeiðið er steðgað, er, at hovbingar hava kravt nógv meiri endurgjald enn Landsverkfrøðingurin vil lata fyri grótið, sum verður tikið burtur.

Tí hevur hagastýrið noktað Landsverkfrøðinginum at halda fram við arbeiðnum og tískil er tað steðgað.

Hovsvegurin er ein tann vánaligast og vandamiklasti landsvegurin í øllum Føroyum, men júst á hesum strekkinum, sum her er talan um, er hann serstakliga ringur: Har er bara pláss fyri einum persónbili, har er onki útsýni og framvið vegnum er ongin bilaverja.

Ætlanin er at gera tunnil ímillum Øravík og Hov og peningurvarð settur av til endamálið á fíggjarlógini fyri í ár at fyrireika arbeiðið fyri.

Men av tí, at farið verður ikki undir tunnilin nú kortini, er tað gjørt av at brúka peningin til onnur endamál í Suðuroynni.

Hildið varð, at hann var frægast farin til at breiðkað eitt strekki omanfyri Hov, sum er serstakliga smalt.

Tað eru nakrar vikur síðani at farið varð undir arbeiðið. Grótið, sum er sprongt burtur, hevur verið brúkt til at fylla út niðri á havnarlagnum á Tvøroyri.

Men so gjørdu hovbingar vart við, at teir vildu ikki góðtaka endurgjaldið, sum Landsverkfrøðingurin vildi lata fyri lendið, sigur Hermundur Michelsen hjá Landsverkfrøðinginum í Suðuroy.

Hann sigur annars, at munnlig avtala varð gjørd við hagastýrið í Hovi um endurgjaldið. Men tá ið semjan skuldi fellast á pappír, kravdi hovbingar meiri.

– Tískil er arbeiðið nú steðgað.

Hann sigur, at Landsverkfrøðingurin letur vanliga letur 12 krónur fyri fermeturin av haga.

– Tað vilja hovbingar ikki góðtaka. T.d. vilja teir eisini hava Landsverkfrøðingin at gera ymisk arbeiði, eitt nú eina rætt, í endurgjaldi fyri grótið.

–Tað hevði verið nógv dýrari og tað vil Landsverkfrøðingurin ikki góðtaka.

Hermundur Michelsen sigur, at nú liggur arbeiðið helst stilt, til lendið er ognartikið, men at tað kann taka fleiri mánaðir, so arbeiðið verður neyvan tikið uppaftur,fyrrenn út ímóti sumri.

Øssur Hammer, formaðurin fyri hagastýrið, váttar at hagastýrið hevur steðgað arbeiðnum.

– Landsverkfrøðingurin hevur bjóðað okkum 12.000 krónur fyri 1.000 fermetrar, men tað vilja vit ikki góðtaka, tí teir fara avstað við øllum grótinum til útbyggingr á Tvøroyri, sigur hann.

Mett verður, at eini 10.000 tons av grótið skulu sprongjast burtur.






# Eldur av skammlopi

ELDSBRUNI
Stefan í Skorini

Seinnapartin sunnudagin 23. desember varð boðað frá einum eldsbruna í einum húsum undir Gráasteini í Havn. Hetta er tann parturin av Landavegnum, ið liggur uttanfyri ringvegin.

Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn sigur, at eldurin stóðst av einum skammlopi í einum sjónvarpi.

Ein eldri kvinna búði í húsunum, og hon var einsamøll inni, tá eldurin kyknaði. Ein ommusonur hennara fekk hana út úr húsunum í øllum góðum.

Øll miðhæddin í húsinum er illa farin av eldi.


*Øll miðhæddin av húsunum fór illa í eldinum*

# Knívur á lofti í KÍ-høllini




HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*

2. jólakvøld fóru tveir ungir dreingir til hendurs í KÍ-høllini. Ein 15 ára gamal tók ein felliknív fram og rendi hann í ryggin á einum 18 ára gomlum.

Maðurin fekk bara eitt lítið prus í ryggin, tí hann var í tjúkkum jakka, ið tók stoytin. Nógv fólk var á staðnum, og tey tóku tann unga dreingin og sendu boð eftir løgregluni, sum handtók hann.

Barnaverndin varð síðani boðsend at koma á løgreglustøðina, tí drongurin er so ungur. Faðir dreingin kom á støðina eftir honum.

15 ár er kriminelli lágmarksaldurin, og tí verður drongurin skuldsettur fyri harðskap. Málið verður sent fútanum, ið skal taka støðu til, um ákæra verður reist.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Brutu inn at drekka

INNBROT
*Stefan í Skorini*

Náttina til jólaaftan klokkan trý korter til trý fekk løgreglan í Runavík eina fráboðan um innbrot á Fiskavirking í Runavík.

Løgreglan fór beinanvegin á staðið og fann seks ungar dreingir inni í bygninginum.

Orsøkin til innbrotið var, at tað var ov kalt í veðrinum, at ganga úti, og tí vildu teir verma seg inni á virkinum. Tá løgreglan kom fram á teir, sótu teir inni og drukku, tí tað var so kalt úti.

Teir vórðu tó handtiknir og skuldsettir fyri innbrot.

## Maður handtikin í húsaófriði

HÚSAÓFRIÐUR
*Stefan í Skorini*

Náttina til hósdagin fekk løgreglan í Vágunum fráboðan um húsaófrið í Sørvági. Fólk, ið vóru ávirkað av rúsdrekka, vóru komin til ilnar, og neyðugt varð at senda boð eftir løgregluni.

Hon handtók ein mann, ið framvegis svav rúsin av sær hósmorgunin. Enn er ikki avgjørt, um maðurin verður skuldsettur fyri nakað. Talan er um ein miðaldrandi mann, ið misti tamarhaldið á sær sjálvum hesa náttina.

## Streymurin fór av ferðsluóhappi

FERÐSLUÓHAPP
*Stefan í Skorini*

Hósmorgunin klokkan seks fór streymurin í einum parti av bygdini í Vestmanna. Orsøkin var, at ein førari mist tamarhaldið á bilinum vegna hálku. Bilurin rendi í ein el-steyra, ið brotnaði, og linjurnar slitnaðu.

Hetta hevði við sær, at ein partur av bygdini misti streymin eina løtu. Menn frá SEV vóru tó skjótir á staðnum og settu nýggjan steyra upp og umvældu el-linjurnar.

## Fjølnir útkomið

ÚTGÁVA
*Stefan í Skorini*

Meginfelag Føroyskra Studenta hevur givið út sættu útgávuna í ár av studentablaðnum Fjølnir. Hetta er seytjandi árgangur. Blaðið inniheldur tilfar, ið er áhugavert hjá lesandi føroyingum.

Eitt nú ger blaðið sínar viðmerkingar til málið um føroyingar á Oyrasundskollegiinum.

Harumframt er eisini hópur av løttum tilfari, og nógvar sera áhugaverdar myndir verða almannakunngjørdar í blaðnum.

## Bilur fór á glið

FERÐSLUÓHAPP
*Stefan í Skorini*

1. jólakvøld var eitt lítið ferðsluóhapp í Elduvík. Ein bilur, ið stóð parkeraður, fór á glið oman ígjøgnum eina brekku í bygdini. Hóast bilurin stóð í geari, og hondbremsan var uppi, so fór hann á glið í hálkuni. Bilurin fekk stóran skaða av óhappinum.